Tórshavn 28. september 2004
Dagført 06. sept. 2006
Rættað 19. jan.2007

**Vegleiðandi trygdarreglur fyri stadionøki, øki til samkomuhald, tónleikatiltøk o.t.**

**1. Alment.**
Øki skulu vera soleiðis háttað, at fullgóð trygd er móti eldi, at eldur ikki breiðir seg á økinum, millum øki og tilhoyrandi bygningar, pallar, høli og skýli bæði innan og uttandurða. Góðar umstøður skulu vera hjá fólki at sleppa til rýmingar, tá eldur er í ella vandi er fyri tílíkum. Góðar umstøður skulu vera at sløkkja eld og at bjarga fólkum út úr møguligum vandaøki.

**Vegleiðandi ásetingar í hesi reglugerð verða greinað soleiðis:**

**2. Umsókn og góðkenning.**
Umboð fyri øki til uttandura ítrótt, tónleikatiltøk o.t. við tilhoyrandi útgerð, innrættingum, hølum, ið leita sær brunatrygdarliga góðkenning skulu lata kommununi útgreinaða lýsing um fólkatal og lata henni tekningar og frágreiðingar til tess at fáa gyldugt loyvi.

Umsóknin skal latast inn av einum persóni, ið hevur ábyrgd fyri tiltakinum á tí ávísa økinum og tilhoyrandi bygningum o.t.
Til tess at fáa brunatrygdarliga váttan frá Brunaumsjón landsins skal latast tilfar inn, sum lýsir, at viðurskiftini á staðnum eru í samsvari við niðanfyri nevndu punkt, ella eru gingin á møti á ein fyri trygdini nøktandi hátt.

**3. Frágreiðing, lýsing.**
Yvirlitstekning í máti ikki minni enn 1: 1000 skal vísa økis- og lendisviðurskiftini og rýmingarviðurskiftini.
Yvirlitstekning í máti 1: (100 ella 500) skal vísa áskoðarapallar ella áskoðaraskýli við máti, ið tilskilar breidd á rýmingarleið og hvar gelendarar í áskoðaraøkjum, gonguøkjum og rýmingarleiðum eru, og annað trygdini viðkomandi.

**4. Rýmingarleiðir.**
Tún/gonguøki skulu vera í minsta lagi 130 cm breið og trappur í minsta lagi 100 cm breiðar, tó í minsta lagi 1 cm fyri hvørt fólkið, ið er ætlað at sleppa burtur tann ávísa vegin.
Tún/gonguøki, sum halla og trappur skulu vera umgyrd t.d. við hondlistum, sum eru í minsta lagi 80 cm yvir trappuforkantum og 90 cm yvir túnum/gonguøkjum/pallum.
Glopp í rimaverki um trappur o.t. skulu ikki vera víðari enn 12 cm.
Trapputrin ella partur av trappu, sum hevur minni "grund" enn 20 cm og stig hægri enn 21 cm, verður ikki roknað sum rýmingarleið.

**5. Tilhald hjá bjargingarliði, fyrstuhjálp, útgerð.**

Á økjum við tiltøkum til fleiri enn 1500 áskoðarar skal verða tilskilað, hvar bjargingarfólk kunnu hava tilhald. Eisini kann tilskilast, um aðrar uppgávur eru tillutaðar bjargingarliðinum og hvørja útgerð, tal av fólkum liðið møtir við.

**6. Møtipláss til sløkkilið, sjúkrabil.**
Á yvirlitstekning skal vera víst, hvar pláss verður hildið opið til sjúkrabil ella sløkkiliðsbil. Plássið skal vera í nánd av høvuðsinngongini, ella øðrum hóskandi staði.
Koyrandi skal vera til og frá undir øllum tiltakinum.

**7. Yvireftirlit.**
Á økjum við tiltøkum fyri fleiri enn 3000 áskoðarum skal verða tilskilað, hvar yvireftirlit hevur tilhald og hvussu samskiftið millum eftirlitsfólk og yvireftirlit fer fram.
Tilskilast skal, hvørji boð, ið roknast kunnu við verða givin til áskoðararnar og, hvørji boð verða givin til vaktarfólkini.
Hóskandi tal av vaktarfólki skulu vera við hvørja inngongd. Ein ætlan skal vera fyri, hvørjar uppgávur vaktarfólk hava umframt atgongueftirlitið, m.a. at lata portur og atgongulið upp eftir boðum frá samskipandi leiðaranum (yvireftirlitinum) fyri tiltakinum.

**8. El.**
Har rýmingarviðurskifti hava við sær el-installatiónir, vanlig el-ljós og møgulig útgonguljós í rýmingarleiðunum, skulu hesi verða gjørd av góðkendum el-innleggjara.
Somuleiðis skulu lýsingartalvur fram við leikvøllum, el-skipan til sølubásar, upphiting í tjaldi o.a. verða monterað og íbundin el-veitingarskipanina av góðkendum el-innleggjara.

El-kaðlar, kaðlar til hátalarar, stýriskipan til leikpall, tjøld, básar, til lampustøð o.t. skulu leggjast so at áskoðarafólk ikki kunnu koma at teimum. Høvuðsavbrótari skal vera á høgligum stað, sum einans fyrireikarar og ella sløkkiliðsmanning kunnu koma fram at.

**9. Áskoðarapallar og skýli.**
Stólauppstilling á áskoðaraøki og palli skal vera í minsta lagi 80 cm frá stólaryggi til stólarygg. Hvørt setur skal vera í minsta lagi 50 cm breitt. Ein stólarekkja skal ikki vera longri enn 24 setur. Stólarekkja, ið hevur rýmingarleið bara annan vegin, skal ikki vera longri enn 12 setur.
Standipláss til fleiri enn 2000 fólk skulu fyri hvørjar 10 m hava rekkverk at forða móti troking.
Í rýmingarleiðum til fleiri enn 150 fólk skulu somuleiðs vera gelendarar at stiga seg til og sum forða fyri troking.
Gyrðingar millum áskoðaraøkið og leikpall, leikvøll og í rýmingarleiðum skulu vera tryggar og kunna standa móti fólkatrýsti.
Forðingar móti troking skulu verða á áskoðaraøkjum og í rýmingarleiðum til fleiri enn 500 fólk í trunka - á sama øki.

**10. Skiftirum, høli til serligar áskoðarar, ymisk tilhaldshøli.**
Skiftirúm, inngonguhøli tilhaldshøli og onnur viðkomandi høli skulu vera í samsvari við tann bygningsflokkin, sum ásetingarnar í KBB-99 tilskila.

**11. Fyribils sølubásar og tílíkt.**
Sølubásar ella tílíkt, sum verður sett upp við ymisk høvi skulu setast á ein hátt at hesi ikki darva rýmingarviðurskiftini og trygdina annars.

Í innrættingarætlanum fyri stadionøkið skal lýsast, hvar básar og tílíkt eru ætlað at standa.

**12. Fyribils orkesturpallar.**
Pallar skulu vera bygdir tryggir. Op undir pallum skulu ikki brúkast til ruskgoymslu ella goymslu til eldført tilfar. Kring pallin skal vera klætt ella stikað, so økið undir honum ikki kann brúkast til tílíka goymslu.
Gyrðingar ella forðingar mugu ikki vera, ið hindra fólki á pallinum at koma til rýmingar framman og aftan á pallinum.

**13. Øki til tjalding.**
Ikki fleiri enn 8 tjøld 3 m x 4 m hvørt kunnu standa nærri hvørjum øðrum enn 3,5 m.
Millum hvønn trunka skal vera í minsta lagi 3,5 m.
Eitt tjald er roknað til at í mesta lagi 4 fólk kunnu liggja í tí.
Tjald skal soleiðis fyri fleiri enn hvørji 4 fólk, roknast sum eitt tjald fyri seg.
Tjaldingarøki til fleiri enn 150 fólk skal hava serstaka brunatrygdarliga og kommunala málsviðgerð, mest við atliti til atkomuvegir og fráleikar.

**14. Bál / grúgvupláss úti.**
Eldstaður, Grill o.t. til kol, gass ella annað brenni skal vera í minsta lagi 4,5 m frá tjøldum í trunka. Atlit skal takast fyri, at brenni ikki kann fúka og fyri vindi.
Loyvi til fleiri enn 2 bál- ella grúgvupláss skulu hava serstaka brunatrygdarliga og kommunala málsviðgerð, mest við atliti til sløkkiútgerð, atkomuvegir og fráleikar.

**15. Sløkkiútgerð.**
Á leikpallum skal á sjónskum stað vera í minsta lagi ein 6 kg pulvur- ella 5 kg $CO_2$-sløkkjari.
Næst báli, grúgvuplássi o.t., ið er nærri enn 4,5 m frá fleiri enn tveimum tjaldatrunkum skal vera í minsta lagi ein 6 kg pulvursløkkjari ella vatnslanga, ið kann nýtast til at sløkkja eld við.
Sløkkiútgerð í bygningum og t.d. størri tjøldum til samkomuhald, skulu hava sløkkiútgerð samb. byggireglunum.

---

Grundað á, at brunaumsjónin ikki hevur útgreinaðar reglur fyri fleiri av punktunum, fer málsviðgerðin soleiðis fram, at sambært upplýsingunum, frágreiðingum og tekningum, verður í ávísum førum gjørd ein meting um trygdina og neyðug krøv.
Eftir tílíka málsviðgerð, verður hon latin umsøkjaranum og/ella kommununi.

**Tjaldingarpláss**




Samskiftisleiðir
112
Yvireftirlit
Ítróttarøki
Kontrollørar
Áskoðarar

| | færri enn 500 | 500 fólk | 1500 fólk | 3000 fólk | fleiri enn 3000 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Alment.** | ** | ** | ** | ** | ** |
| **Góðkenningar.** | | ** | ** | ** | ** |
| **Frágreiðing.** | ** | * | * | * | * |
| **Tilhald bjargingarlið, fyrstuhjálp, útgerð.** | | | * | * | * |
| **Møtipláss sløkkilið, sjúkrabil.** | | | * | * | * |
| **Yvireftirlit.** | | | | * | * |
| **El.** | ** | ** | ** | ** | ** |
| **Áskoðarapallar og skýli.** | * | * | * | * | * |
| **Skiftirúm, høli til serligar áskoðarar, ymisk tilhaldshøli.** | * | * | * | * | * |
| **Fyribils sølubásar og tílíkt.** | * | * | * | * | * |
| | | | | | |
| | **Fleiri enn 8 tjøld** | | | | |
| **Tjalding í trunka** | | | | | |
| **Fráleikar** | * | | | | |
| **Bál / Grúgvupláss** | * | | | | |
| **Galdandi fyri alla bygging er merkt **** | | | | | |
| | | | | | |

**Dømi um málgongd fyri størri stadion- ella áskoðaraøki.**

Øki til fleiri enn 500 fólk

1. Eigari søkir kommununa um loyvi.
2. Eigari søkir Brunaumsjón landsins um brunaliga trygdargóðkenning
    a. krøv, sum brunaumsjónin setir, skulu góðkennast av kommununi
    b. Kommunan góðtekur settu krøvini
3. Eigari eftirlíkar krøvini
4. Brunaumsjónin gevur viðmæli og kommunan gevur endaliga góðkenning.

# Váttan fyri trygdarviðurskiftum fyri uttandura samkomuhaldi o.t.

**Navn á staðnum og tiltakinum**:_____________________________________

_______________________________________________________________

*Eftirlit undan nýtslu: Set ok fyri í lagi, minus fyri ikki í lagi, og 0 fyri óviðkomandi.*

 Hurðar, portur í rýmingarleiðum kunnu latast upp innanífrá uttan lykil ella nakað amboð og hava fulla kravda hædd og breidd.

 Ongar forðingar eru, einki órudd er í rýmingarleiðunum.

 Fyribilspallur er uppsettur og lýkur ásetingar um rýmingarleið, sløkkiútgerð, el, avbyrging. Forðing er fyri óruddi undir pallinum o.t.

 Kravd útgongulós og neyðljós eru sjónlig og virka.

 Kravd skelti um mest loyvda fólkatal er sligið upp á sjónskum stað.

 Yvirlit fyri stóla- og ella borðuppstillingarætlanum er sligið upp á sjónskum stað.

 Borð- og stólauppstilling er í samsvari við góðkendu uppstillingarætlanina.

 Kravd sløkkiútgerð er á hóskandi støðum.

 Starvsfólk, vaktarfólk eru kunnað um mest loyvda fólkatal og um viðurskiftini á staðnum, sløkkiútgerð o.t.

 Starvsfólk, vaktarfólk eru kunnað um rýmingarviðurskiftini, atkomuviðurskifti til neyðhjálp o.t.

Ábøtur skulu gerast beinan vegin Ja__________________ Nei____________________

**Omanfyri tilskilaðu punkt eru kannað og staðfest at vera í lagi.**

Dagur, klokkutími fyri eftirlitinum:________________________________________

Skilligt navn á ábyrgdarhavandi / umsøkjara:______________________________

Undirskrift hjá ábyrgdarhavandi / umsøkjara:______________________________